## Skotska landsliðið tikið út

Walther Smith hevur tikði 23 spælarar út til hópin, sum skal spæla landsdystir ímóti Føroyum og Litava. Í hópinum eru spælarar úr kendum feløgum sum Manchester United, Everton, Celtic og West Ham.

Hesir spælarar eru tiknir út: Neil Alexander (Cardiff City), Craig Gordon (Heart of Midlothian), Graeme Smith (Motherwell), Graham Alexander (Preston North End), Russell Anderson (Aberdeen), Gary Caldwell (Celtic), Christian Dailly (West Ham United), Stephen McManus (Celtic), Graeme Murty (Reading), Gary Naysmith (Everton), Robbie Neilson (Heart of Midlothian), Steven Pressley (Heart of Midlothian), David Weir (Everton), Darren Fletcher (Manchester United), Paul Hartley (Heart of Midlothian), Lee McCulloch (Wigan Athletic), Nigel Quashie (West Bromwich Albion), Scott Severin (Aberdeen), Gary Teale (Wigan Athletic), Kris Boyd (Rangers), James McFadden (Everton), Kenny Miller (Celtic) og Garry O'Connor (Lokomotiv Moscow).

## Sparkivøllur í Lamba

Fríggjadagin varð nýggi sparkivøllurin í Lamba tikin í nýtslu. Í hesum sambandi hevði Runavíkar Býráð skipað fyri einum lítlum hátíðarhaldi við vøllin, har heilt fitt av fólki vóru møtt. Hetta er tann 7. vøllurin av umleið 40 Sparkivøllum, ið alment er tikin í brúk. Fleiri aðrir sparkivallir eru í ger í løtuni, og í heyst fer FSF saman við nøkrum kommunum í holt við at gera nakrar nýggjar afturat.

## AB kann taka stórt fet móti bestu deildini

**Sunnudagin spæla AB og LÍF avgerandi dyst í toppinum í næstbestu deildini. AB kann við sigri taka seg sjey stig fram um LÍF**

1. DEILD

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

AB og LÍF spæla ein veruliga seks-stigdyst á Argjum sunnudagin. Liðini kappast um at sleppa upp í Formuladeildina, og dysturin sunnudagin kann vera avgerandi í hesari kapping.

Í løtuni liggur B71 fremst við 48 stigum, meðan AB er næstfremst við 46 stigum. LÍF liggur nummar trý við 42 stigum, og teir skulu fram millum tvey tey fremstu feløgini, um uppflytingin skal gerast veruleiki.

Tí standa týdningarmikil stig upp á spæl, tá ið AB og LÍF bresta saman sunnudagin. Vinnur AB dystin, fer liðið eitt góða leiðslu upp á sjey stig til LÍF. Klára leirvíkingar hinvegin at vinna, so er rættiligur spenningur komin íaftur, tí so verður bert eitt stig á muni millum liðini.

– Vit verða noyddir at vinna dystin, um vit skulu gera okkum galdandi. Vit skulu spæla stabilt, og tað er týdningarmikið, at vit spæla soleiðis, sum vit gjørdu fyrr í kappingarárinum, sigur Andrias Lava Olsen, álopsspælari, við heimasíðuna hjá LÍF.

B71, sum liggur best fyri, skal sunnudagin, skal spæla ímóti HB í Havn, meðan TB, sum er fjórði kandidaturin til uppflyting, fær vitjan av KÍ.

# Christian Høgni fer til Danmarkar at spæla

**– Eg havi ambitiónir um at spæla í superliguni aftur, og tí fari eg til Danmarkar at royna meg aftur, sigur toppskjúttin í Formuladeildini, Christian Høgni Jacobsen, sum seinastu tvey árini hevur spælt fyri NSÍ**

FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tá ið fótbóltskappingin í Føroyum endar í oktober mánaði, pakkar álopsessið hjá NSÍ, Christian Høgni Jacobsen, kuffertini og flytir til Danmark at búgva. Fótbólturin dregur hann av landinum aftur, og málið er at spæla á hægsta stigi í Danmark.

– Eg havi ambitiónir um at spæla í superliguni aftur, og tí fari eg til Danmarkar at royna meg aftur, sigur Christian Høgni.

### Gingið strúkandi

Christian Høgni hevur áður spælt fyri donsk feløg og hevur eisini roynt seg í superliguni, men fyri hálvumtriðja ári síðani flutti hann heimaftur til Føroya við álvarsomum skaða. Seinastu tvey árini hevur Christian Høgni spælt fyri barndómsfelagið NSÍ, og serliga í hesum kappingarárinum hevur hann verið flúgvandi.

– Tað hevur gingið væl í ár, og eg ætli mær eisini at spæla hetta kappingarárið liðugt í NSÍ, áðrenn eg fari avstað, sigur hann.

### Fleiri møguleikar

Christian Høgni ætlar at flyta til danska høvuðsstaðarøkið, og har eru nógv feløg, sum spæla á høgum stigi.

Fyrrverandi landsliðsvenjarin Henrik Larsen er venjari hjá 1. deildarfelagnum Køge, og har er áhugi fyri Christian Høgna.

– Eg havi ikki gjørt av, hvar eg fari at spæla. Eg havi nakrar møguleikar, sum eg umhugsi, sigur hann.



*Christian Høgni Jacobsen, sum hevur verið millum bestu spælararnar í Formuladeildini í ár, fer í oktober aftur til Danmarkar at royna seg sum fótbóltsspælari*

# GÍ fær styrk til grannadystin

**Sámal Joensen og Magni Jarnskor eru klárir at spæla aftur fyri GÍ, meðan ÍF má spæla uttan fleiri av sínum føstu spælarum**

ÍF-GÍ

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Sunnudagin spæla ÍF og GÍ grannauppgerð í Fuglafirði. GÍ er dragnað nakað í toppstríðnum, men hongur framvegis í teimum fremstu feløgunum og vil hava ein sigur. ÍF liggur niðast í Formuladeildina og hungrar eftir stigum. Fortreytirnar eru tí góðar til ein góða dyst í Fuglafirði sunnudagin.

ÍF manglar fleiri spælarar til dystin. Bartal Eliasen hevur fingið ein snudd í østbeinið, og hann kann ikki spæla. Bartal var heldur ikki við ímóti EB/Streymi mikukvøldið, og møguliga gongur nakað av tíð, áðrenn hann kann spæla aftur.

Hanus Eliasen fekk ein løst í armin á Eiði mikukvøldið. Í fyrstu syftu varð stúrt fyri, at armurin var brotin, men so álvarsamt var tað ikki, og roknað verður við, at Hanus spælir sunnudagin. Beiggin Símun hevur eisini drigist við eini minni snudd, men hann spælir eisini ímóti GÍ.

Klaksvíkingurin Tórður Lervig fekk gult kort seinast, og hann hevur leikbann. Harafturat er Fritleif í Lambanum ikki komin fyri seg aftur eftir skaða.

### GÍ fær góðan styrk

Hjá GÍ stendur heilt væl til við fólki til dystin um vikuskiftið. Seinastu dystirnar hevur miðvallarovastin Sámal Joensen ikki verið við, men hann hevur nú vant aftur, og hann kann spæla sunnudagin.

Eisini Magni Jarnskor hevur drigist við skaða í hælsinuni, men hann er somuleiðis klárur at spæla sunnudagin.

Tí fær GÍ góðan styrk frá tveimum royndum spælarum til dystin ímóti ÍF.

Sam Jacobse hevði leikbann seinast, men hann er tøkur aftur. Hinvegin hevur Símun Louis Jacobsen leikbann til dystin sunnudagin.

**Formuladeildin**

| | | |
|---|---|---|
| 27/8 | HB-Skála | Rúni Gaardbo |
| 27/8 | EB/Streymur-NSÍ | Petur Reinert |
| 27/8 | VB/Sumba-B36 | Lassin Isaksen |
| 27/8 | B68-KÍ | Lars Muller |
| 27/8 | ÍF-GÍ | Dagfinn Olsen |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 26/8 | TB-KÍ | Páll Augustinussen |
| 26/8 | HB-B71 | Regin Egholm |
| 26/8 | FSV04-VB/Sumba | Dan Højgaard |
| 26/8 | SÍ-Royn | Jón S. Gleðisheygg |
| 27/8 | AB-LÍF | Ransin N. Djurhuus |

**1. deild kvinnur - finalubólkur**

| | | |
|---|---|---|
| 27/8 | AB-EB/Streymur | Bergleif Sólsker |
| 27/8 | GÍ-KÍ | Edvard Højgaard |

**1. deild kvinnur – B-bólkur**

| | | |
|---|---|---|
| 27/8 | B36-NSÍ | Ørvur á Lag |
| 27/8 | SÍ-HB | Jóhan H. Ellefsen |